## Gunnar nógv spældur

Fyrsta stakfløgan hjá Gunnari Mikkelsen, Haunted Honeymoon, verður nógv spæld í donskum útvarpi, og hon er eisini við á onkrum hitlistum.

Á Tjeklistanum, sum P3 hjá Danmarks Radio ger eina ferð um vikuna, er Gunnar Mikkelsen hesa vikuna komin inn á listan sum nummar 29.

Og tað, sum kanska hevur líka nógv at siga er, at sangurin er millum 20 teir mest spældu í Danmark í løtuni. Á Airplay listanum, sum AC Nielsen AIM ger upp fyri donsku plátuvinnuna, er Haunted Honeymoon nummar 19.

Fyrsta fløgan hjá Gunnari Mikkelsen kom úr í gjár, og næstu dagarnar fer Gunnar at spæla unplugged á ymsum útvarpsrásum kring Danmark.

## Grand Prixið í kreppu

Europeiska Melodi Grand Prixið er í kreppu, og orsøkin er, at suður- og eystureuropeisk lond hava sett seg á 50 ára gomlu tónleikakappingina. Tað heldur Jan Eriksen, blaðmaður á BT, sum seinastu dagarnar hevur dekkað Grand Prixið í Turkaland.

Í einari hvassari viðmerking í BT skrivar hann, at teir mongu griksku, turkisku og jugoslavisku innflytararnir í Europa atkvøða í stórum tali fyri sínum heimlandi, og hjá teimum snýr tað seg meira um móðurlandskærleika enn tónleik. Bara í Týsklandi atkvøddu í fjør meira enn ein millión turkarar.

– Góð løg vóru líka so vælkomin í Grand Prixnum hesaferð, sum kurdiska frælsisrørslan hevði verið tað á áhoyrararplássunum, skrivar Jan Erikssen og heldur, at londu sum Holland, England, Týskland og Noreg, sum høvdu sangir við góðum løgum, vóru revsað.

Blaðmaðurin á BT mælir til, at tað fremeftir verða ein norðurvestureuropeisk hálvfinalan og ein suðureystureuropeisk hálvfinala, og so sleppa eins nógv lond úr hesum pørtum av Europa við í finaluna.

Hesaferð vann Ruslana úr Ukraina Grand Prixið.

# Týr heiðraðir á útgávu

**Íslendski bólkurin Guitar Islancio hevur góðar og garvaðar limir og nú hevur bólkurin givið út fløgu við yndisløgum, ið hava uppruna á okkara leiðum. Scandinavian Songs er 4. fløga teirra og eisini Týr hava heiðurin at eiga eitt lag á fløguni**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*



Um vikuskiftið gav Guitar Islancio út 4. fløguna, har nakrir siðbundnir íslendskir sangir eru á, umframt sangir úr skandinavisku londunum. Sangirnir eru kendir og væl dámdir í Íslandi, uttan kanska eini sangurin úr Grønlandi og sangurin úr Føroyum.

Tutl gav í 1999 út fløguna Rock from the cold Seas, ið Jens Guð samskipaði. Síðani hava íslendingar hugsað um íslendkan tónleik sum part av størri høpi í skandinaviskum samanhangi, einamest Føroyar, Ísland og Grønland.

Tá Týr komu við best dámda sangi í Íslandi í 2002, Orminum Langa, gjørdist hetta samanhang sjónligari. Sum so mangur íslendingur, so fall manningin í Guitar Islancio fyri Týr og Orminum Langa og vildu teir tí gera eina útgávu av einum lag hjá Týr til 4. fløguna hjá Guitar Islancio. Og tað gjørdist lagið Kærleiki til fostur-jørð.

Í samrøðu við Morginblaðið sigur manningin í Guitar Islancio, at teir hava eitt sindur av heavy guitar í lagnum, sum ein heiður til rockbólkin Týr, sum teir meta høgt. Týr ger siðbundnar sangir og vísur til rock, eins og Guitar Islancio ger siðbundnan tónleik til jazz og swing.

### Góðir menn

Guitar Islancio er instrumentalbólkur, ein trio við tveimum guitarum og bassi. Ein av guitarleikarunum er ein hin tekniskt besti í Íslandi, Bjørn Thoroddsen.

Hin er Gunnar Thórðarson, ið er kendastur sum guitarleikari í einum av fyrstu kendu "Beatles-bólkunum" í Íslandi, , nevniliga Hjólmar. Hjólmar var høvuðsbólkur Íslands í sekstiárunum. Bólkurin gav undir navninum Thor's Hammer út eina altjóða plátu, ið varð seld í 40.000 eintøkum kring heimin, mest í Bretlandi.

Í 1968 stovnaði Gunnar progressiva bólkin Trúbrót. Bólkurin spældi í nøkur ár og var nærum eitt sonevnt superband, har limirnir vóru kendir sum dugnaligir á ljóðførini innan rockheimin. Bólkurin spældi tónleik sum lá tætt við Led Zeppelin og Frank Zappa.

Íslendskir tónleikarar eru ikki vanir at endurspæla føroyskan tónleik, tó heimildarmaður okkara, Jens Guð, sigur seg minnast, at t.d. Hera Bjørk sang Aldurnar í tær og at Blásarakvintett Reykjavíkar hevur leikt tónleik eftir Kristian Blak.

# Filadelfia forkunnuga vitjan úr Zambia

MØTIR
*Tíðindaskriv*

Í døgunum 29. mai til 4. juni 2004 bjóðar Filadelfia samkoman við Landavegin 22 í Havn til møtirøðina »Rørir tað teg?« við Zambiska prestinum Robert Bwalya.

Í samband við at Robert Bwalya heldur møtir í Englandi og Danmark, hevur tað eydnast Filadelfia, at fáa hann til Føroyar at hava eina møtirøð. Hann er prestur hjá einari samkomu við umleið 1.200 limum í triðstørsta býnum í Zambia, Ndola.

Ígjøgnum tætt samstarv við skúla-, heilsu-, og lógarverkið verður hann nýttur sum síðsta loysn til tey menniskju ið hesir stovnar hava uppgivið. Við at taka tað andaliga við inn í viðgerðina hevur hann í Jesu navnið hjálpt og grøtt 80 % av teimum.

Robert Bwalya er nógv virdur millum tað Zambiska fólki, hetta sæst aftur millum annað við tað, at hann er tjóðarráðgevi fyri endurreisn og varðveitan av hjúnabandinum.

Eftir eina ógvusliga uppliving var Robert umvendur. Robert sigur sjálvur frá at hann eftir eina langa sjúkralegu doyði, har hann var tikin upp til himmals, og upplivdi sannleikan um, at tað er meira millum himmal og jørð, enn hann sjálvur vildi verða við.

Møtirøðin byrjar leygarkvøldið 29. mai kl. 19.00 og heldur fram øll kvøldini kl. 19.00 fram til fríggjakvøldið 4. juni. Tað verða eisini skipa fyri øðrum tiltøkum í samband við møtirøðina, so sum lovsongskonsert og morgunmøti hvítusunnudagarnar.

Tað er Filadelfia samkoman í havn við sínum umleið 150 limum, sum hevur fingið hesa forkunnugu vitjan í lag. Tey seinastu 8 árini hava Sólrún og Tummas Jacobsen verið fyristøðupar, og afturat sær í leiðsluni hava tey ein leiðslubólk, ið telur fýra fólk. Samkoman hevur seinastu árini skipað fyri fleiri líknandi tiltøkum, har øll hava verið væl vitjaði. Gjøgnum heimasíðuna www.filadelfia.fo eru fleiri upplýsningar at fáa um samkomuna og um møtirøðina við Robert Bwalya.

# Kvinnuting Tjóðveldisfloksins

TÍÐINDASKRIV
*Kvinnuting Tjóðveldisfloksins*

Kvinnuting verður hósdagin 20. mai frá kl. 08:30 til kl. 15:00 í hølum floksins.

- Er tað maktstrðið, sum heldur kvinnum aftur í at taka lut í politikki
- Hvussu skúla vit kvinnur og menn í javnstøðu
- Fyri hvønn er javnstøða
- Hvussu er kynið í málið okkara
- Ber tað til at verða smábarnamamma og frammarlaga í politikki
- Hvussu var støðan, hvussu er hon og hvat er til ráða at taka
- Royndir í kommunalpolitikki og í landspolitikki

Millum annað hesir spurningar og evni verða umrødd á kvinnutinginum, har kvinnur úr Tjóðveldisflokkinum við ymiskum royndum fara at røða.

Fólkaræðislig tilvild ella vilji fólksins?

Fyrst í árinum var val til løgtingið. Fólkið valdi tríggjar kvinnur og nýggjogtjúgu menn. Tvær vikur seinni var samgongan skipað. Samgongan valdi onga kvinnu og sjey menn í landsstýrið, umframt at og hon valdi sjey menn og onga kvinnu í teir sjey formanspostarnar í maktmiklu løgtingsnevndunum.

Hesin ójavni hevur veruliga sett ljóskastaran á javnstøðuna í Føroyum. Er ójavna kynsumboðanin á politiska pallinum umboðandi føroya fólks vilja og hugburð, ella er tað ein fólkaræðislig tilvild, sum gav okkum úrslitið?

Hvaðani eru vit. Hvar eru vit. Hvagar fara vit.

At støðan bleiv sum hon bleiv, er millum annað orsøkin til, at kvinnur í Tjóðveldisflokkinum hava tikið seg saman at umrøða evnið "javnstøða" útfrá søguligum- og nútíðareyðkennum og við framtíðarmøguleikum.

Dagurin verður skipaður við fýra pallborðum, har kvinnur við ymiskum royndum koma at røða um javnstøðuspurningar. Millum hvørt pallborð verður høvi at gera viðmerkingar og seta spurningar.

Laufey H. Blaasvær setir tingið kl. 09:00.

Við fyrsta pallborðið, sum byrjar kl. 09:15 sita Karin Kjølbro, Ingrið Sondum og Bergtóra Hanusardóttir.

Kl 10:15 sita við pallborðið: Kristianna Rein, Heidi Petersen og Hildur Eyðunsdóttir.

Tá tær eru lidnar verður ein steðgur millum kl. 11:00 og 12:15.

Triðja pallborðið byrjar kl. 12:30 við Vár í Ólavsstovu, Annitu á Fríðriksmørk og Annlis Bjarkhamar.

Við fjórða pallborðið, sum byrjar kl 13:30 sita Hjørdis Heindriksdóttir og Diana Borgnýardóttir.

Allar tjóðveldishugaðar kvinnur eru vælkomnar og møguleiki er fyri at tekna seg sum lim í Tjóðveldisflokkinum..

Kvinnutingið, sum er ókeypis, byrjar kl. 0830 við morgunmati og endar kl. 15:00 við sangi.

Kvinnur, sum ynskja at taka lut á tinginum verða bidnar um at siga frá, áðrenn mikudagin 19. mai kl. 13:00 á info@norna.fo ella á tlf 22.47.10 ella tlf 31.24.57.



# Telefonstormur í SvF

Sjónvarpið fekk 270 klagur eftir einum tíma, tá ið illir eysturoyingar og kalsoyingar fríggjadagin mistu Sjónvarp Føroya av skíggjanum. Hetta hendi mitt undir kongaliga brúdleypinum í Keypmannahavn, og orsøkin var, at sendarin á Støðlafjalli fekk fyri.

Dimmlætting skrivar, at tað gingu fimm korter, áðrenn Sjónvarpið var aftur at síggja, og hesa løtuna var sannur telefonstormur í Sjónvarpinum.

Mikkjal Helmsdal, stjóri á Sjónvarpi Føroya, sigur við blaðið, at ein maður sat burturav og tók í móti øllum skolunum.

– Til alla lukku bleiv sendarin í ordan aftur áðrenn vígsluna, so hyggjararnir kundu fáa hana við, sigur stjórin í sjónvarpsstjórin.

Sjónvarp Føroya frásigur sær ábyrgdina av hesum óhappi, tí tað er nevniliga ikki Sjónvarpið ið tekur sær av sendinetinum. Tað ger Føroya Tele vegna Vinnumálaráðið, og er tað sostatt



Vinnumálaráðið sum hevur evstu ábyrgdina av, at sendinetið virkar nøktandi, skrivar Dimmalætting.

## Barbara vann

Næstseinasta innleiðandi umfarið í Ársins Songrødd 2004 var leygarkvøldið í Havn.

Barbara Abrahamsen sang lagið »Come what may« úr filminum Moulin Rouge, og tað gjørdi hon so sannførandi, at dómararnir valdu hana til vinnara.

Á øðrum plássi kom Kristleyg Hansen við sanginum »White Flag« hjá Dido. Tær hava báðar luttikið í kappingini áður.

Seinasta innleiðandi umfarið verður í Mentanarhúsinum í Fuglafirði longu komandi leygarkvøld. Finalan verður í Badmintonhøllina 5. juni.

## AFS gongur nýggjar leiðir

**Sum nakað nýtt verður í summar møguleiki hjá ungum føroyingum at fara til Danmarkar at búgva hjá eini vertsfamilju í ein mána. Hetta er byrjanin uppá eitt norðuratlantiskt samstarv millum Føroyar, Ísland, Grønland og Danmark**

Ert tú ímillum 15-19 ár, og hevur tú hug at royna eina øðrvísi avbjóðing í summar, so hevur tú nú møguleika at fara til Danmarkar í fýra vikur. Frá 17. juli til 14. august verður nevniliga skipað fyri einum AFS summarprogrammi.

Tú fert at búgva heima hjá eini danskari familju, sum býr í Keypmannahavnsøkinum. Hetta gevur tær møguleika at kunna teg betur við danska málið og koma tætt inn á danska gerandisdagin, samstundis sum tú lærir nýggj fólk og nýggjar mentanir at kenna.

Fyrstu tvær vikurnar verða ymisk tiltøk á skránni, útferðir o.t. Síðstu tvær vikurnar gongur tú í skúla saman við tínum vertssystkjum, antin í 10. flokk ella í ein studentaskúla.

Um tú ætlar tær á eftirskúla í Danmark, men kennir teg ótryggan við landið og málið, so er hetta ein góð og bleyt byrjan. Um tú fert á eftirskúla, skalt tú ikki í skúla við vertssystkjunum, men beinleiðis í tín egna skúla.

Møguleiki er eisini at fyrireika seg til víðari lesnað í Danmark við at vitja universitet.

Hetta tilboðið stendur bara ungum úr Føroyum, Íslandi og Grønlandi í boði og ætlanin er, um undirtøkan verður nóg góð, at endurtaka tiltakið næsta ár í einum av hinum londunum.

Kostnaður av túrinum er 3500 kr + ferðagjald.

Um tú ynskir at frætta nærri um tilboðið, kanst tú venda tær til Elisabeth Holm, tlf 312991.

**eys**

## Eyðun Elttør stillar upp



Fyrrverandi landsstýrismaðurin Eyðun Elttør verður ein av teimum, sum bjóðar seg fram á býráðsvalinum í Klaksvík seinni í ár. Norðlýsið skrivar, at Norðoya Sjálvstýrisfelag hevur havt sín fyrsta uppstillingarfund, og har var Eyðun Elttør ein av teimum, sum játtaði at stilla upp.

Í løtuni umboðar Karl Heri Joensen Sjálvstýrisflokkin í Klaksvíkar býráði, og hann stillar eisini uppaftur.

